# VIRKISÆTLAN

fyri tað námsfrøðiliga arbeiði hjá **Býlingshúsinum undir Brúnni**





OKTOBER · NOVEMBER · DESEMBER

**OKT. NOV. OG DES.**
4. ársfjórðing seta fokus á eitt nýtt evni úr námsætlanini, t.d. ***Málmenning***. Á starvsfólkafundinum í sep. hava vit eitt upplegg um evnið, t.d. eitt av starvsfólkunum ella fólk útifrá, t.d. taliráðgeva. Vit leggja til rættis, hvussu vit arbeiða húsinum og hvussu vit brúka okkara tilfar um evnið.

Vit hugsavna okkum um evnið, og seta okkum mál við hesum spurningum:
***/ Hvat vilja vit náa? / Hvussu náa vit hesum?***
***/ Hvussu síggja vit at tað eydnast? /*** Í november eftirmeta vit evnið.

**MYNDATØKA** Í september er myndatøka av børnunum á stovninum.

**HEYSTARVERKSTAÐUR** Fyrst í oktober er heystarverkstaður. Uml. 15. oktober fletta vit saman við børnunum. Vit taka upp avroð, gera blóðpylsu, rullupuylsu, blása bløðru v.m.

**JÓLAVERKSTAÐUR** Seinast í november er jólaverkstaður.

**JÓL** Fyrst í desember kl.10.00 er jólahald og vit fáa vitjan av jólamanninum. Seinnapartin er foreldrakaffi og børnini ganga Lucia á stovninum. Allan desember hugna vit okkum nógv saman við børnunum. Vit pynta, baka og fara onkran túr oman í hugnaliga miðbýin. Hvønn fríggjadag kl.10.00 hava vit adventsløtu í alrúminum. Vit lesa/hoyra eina jólasøgu og syngja jólasangir.

**UML. 15. DES.** Fara vit í kirkju og eta jóladøgurða á stovninum.



JANUAR · FEBRUAR · MARS

**JAN. FEB. OG MARS**
1. ársfjórðing arbeiða vit við einum ávísum evni úr námsætlanini. Á fyrsta starvsfólkafundi í januar hava vit eitt upplegg um valda evnið, her hugsavna vit okkum um evni, t.d. við uppleggum frá starvsfólkum sjálvum ella fólki úti frá. T.d. um evni er ***Kroppur, heilsa og rørsla***, kann tað vera ein ergoterapeutur ella heilsusjúkrasystir, sum koma inn og siga frá, hvat tey leggja dent á teirra øki.

Vit hugsavna okkum um evnið, og seta okkum mál við hesum spurningum:
***/ Hvat vilja vit náa? / Hvussu náa vit hesum?***
***/ Hvussu síggja vit at tað eydnast? /*** Í mars eftirmeta vit evnið.

**FØSTULÁVINT** Vit leggja okkum eftir, at dagurin er hugnaligur og stuttligur. Børnini koma pyntaði á stovn og vit sláa tunnu á stovuni, har barnið gongur. Tey fáa okkurt gott í tunnuna, so sum saltstengur, fruktstong og ostahaps. Stovnurin bjóðar døgurða og børnini fáa bollar og saft til millummála.

**GRÆKRISMESSA** Vit tosa um tjaldrið, um hvussu og hvar tjaldrið livir, og vit gera ymiskt kreativt úti og inni.

**PÁSKIR** Páskaverkstaður er 2 vikur áðrenn páskir.









JUNI · JULI · AUGUST · SEPTEMBER

**JUNI OG JULI** Er summarstemningur við nógvum túrum, fríum spæli bæði inni og úti.

**STOVNURIN ER STONGDUR Í VIKU 29/30/31**

**AUG. OG SEP.** Ta fyrstu tíðina eftir summarsteðgin eru vit mest á stovninum og finna okkum til rættis.

Vit hava nógvar innkoyringar bæði í vøggustovunum og í barnagarðinum, og tað er sera umráðandi, at øll fáa eina góða og trygga byrjan eftir summarsteðgin. Vit klemma og hava nógva nærveru.



APRÍL · MAI

**APRÍL, MAI OG JUNI** 2. ársfjórðing seta vit fokus á eitt nýtt evni úr námsætlanini. Hesa tíðina eru vit nógv úti í náttúruni, og tí er upplagt at arbeiða við evninum ***Børn og náttúra***. Á starvsfólkafundinum í apríl seta vit evnið á skránna, vit hava upplegg um evni, eitt nú kann tað bæði vera starvsfólk í húsinum, ella fólk úti frá, sum eru við til at kveikja áhugan og hvussu vit kunnu arbeiða við valdað evninum.

Vit hugsavna okkum um evnið, og seta okkum mál við hesum spurningum:
***/ Hvat vilja vit náa? / Hvussu náa vit hesum?***
***/ Hvussu síggja vit at tað eydnast? /*** Í juni eftirmeta vit evnið

**25. APRÍL** Vit halda Flaggdagin við at gera fløgg, tosa og syngja um ***Merkið***.

**BLÓMUVIKA** Børnini hava øll eina blómu við á stovnin, sum tey saman við starvsfólkunum planta úti í garðinum, og hava ábyrgd av í gjøgnum summarið. Børnini fáa her eina kenslu av at tey eru ein partur av at halda garðin hugnaligan.

**GARÐDAGUR** Seinast í mai hava vit ein garðdag saman við foreldrunum. Foreldrini koma frá kl. 15.00 til 18.00. Vit rudda, lúka v.m. Foreldrini baka køkur og taka breyð við, og stovnurin bjóðar kaffi, te og saft.



## RELATIÓNSARBEIÐI

Relatiónsarbeiði er grundarlag fyri okkara arbeiði við børnunum, tað er avgerandi fyri, at børnini kunnu trívast og mennast.

Trivnaðurin á stovninum skal altíð vera í hásæti, og tí er tað umráðandi, at børn, starvsfólk og foreldur eru í einum góðum og jaligum umhvørvi, har tey kenna seg væl.

Børn og foreldur skulu kenna seg væl, tá tey koma á stovnin. Tey vera viðurkend fyri tað, tey eru og teirra samleika. Vit eru rúmlig og vit síggja ymisleikar sum eina styrki í okkara arbeiði.

Vit eru týðilig í okkara arbeiði, seta orð á alt vit gera og vit brúka myndir/piktogrammir, tá vit samskifta og skipa dagin.

## OKKARA MENTAN

Í dagliga arbeiðinum tosa vit nógv um okkara samleika,og hvussu vit liva her í Føroyum. Vit syngja føroyskar barnasangir, siga frá søgum og sagnum, og vit spæla ymisk føroysk spøl bæði inni og úti.

Vit eru nógv í náttúruni, vit vitja okkara nærumhvørvi og læra fjøruna og hagan at kenna.

Vit vitja ymisk søvn og vit eru á standmyndaveiðu í býnum. Vit fyrireika okkum væl áðrenn vit fara. Tá vit eru aftur, tosa vit um tað, vit hava sæð, t.d. tekna, mála og ymiskt annað.

Vit tosa um okkara fulgalív, tá teir koma og fara, hvussu og hvar teir liva her hjá okkum. Vit tosa um høgtíðirnar og halgidagar, hví vit hava hesar dagar og hvussu vit halda teir her hjá okkum.

Um heystið, fletta vit í alrúminum, taka upp avroð, gera blóðpylsu og rullupylsu saman við børnunum. Uml. 4 ferðir um árið eta vit føroyska mat til døgurða, t.d. blóðpylsu, fiskafrikadellir, lambasteik.

## RÁÐLEGGINGARDAGAR

Vit hava tveir ráleggingardagar um árið. Ein ráðleggingardag leggja vit okkum eftir at fáa íblástur útifrá. T.d. øll fara á okkurt viðkomandi skeið.

Ein ráðleggingardag eru vit í húsinum og arbeiða við at leggja árið til rættis.

## FORELDRASAMRØÐUR

Øll fáa bjóðað eina samrøðu 3–6 mðr. eftir tey eru byrjað á stovninum. Og síðan áðrenn tey fara í barnagarð. Tað sama tá tey byrja í barnagarðinum og áðrenn tey fara víðari í skúla. Foreldur eru altíð vælkomin til eina samrøðu, um tørvur er á tí.

## SPÆLIKLÓK

Vit hugsavna okkum um spælið og rúmið hjá barninum. Hvussu vit á besta hátt kunnu skapa eitt mennandi umhvørvi. Vit eri tilvitað um barnaumhvørvið, og hvussu vit innrætta okkum estetiskt, fysiskt og psykiskt.

Tað er sera umráðandi fyri menningina hjá barninum, at vit taka støði í, hvørji børn er á stovninum, og hvønn tørv, avbjóðingar og áhuga tey hava.

## DOKUMENTATIÓN

Stovurnar skriva/tekna, hvør í sínum lagi, á talvuna ella bókina sum liggur í gongini. Vit leggja myndir á Foreldragluggan og vit brúka instagramprofilin **bylingshúsid_undirbrunni** til brellbitar.